Summarkapping 2008

LÝSINGARTILFAR



# Gamalt og nýtt í Stavanger

Stavanger er fjórðstørsti býur í Norra og ein av elstu býunum í landinum. Fólk byrjaðu at búseta seg har í 1100-talinum í eini tíð við fólkavøkstri og tilflyting til býirnar í øllum Norðurevropa.

Stavanger var í mong ár ein fiskivinnubýur og er serliga kendur fyri sítt virksemi innan sildafiskiskap og skipasmiðjuídnað. Tað sum hevði við sjógvin at gera var største útflutningsvøran og er tað enn.

Gomlu verksmiðjubygningarnir úr timbri frá silda- og fiskiídnaðinum niðri við havnalagið standa í dag stórum mótsetningi til modernaðu bygningar úr betongi, glasi og stáli, sum eru ímyndin av vælstandinum í einum av mest týðandi oljubýum í Evropa. Hesir bygningar vísa best broytingarnar, sum seinastu árini eru farnir fram í Stavanger.

Í dag er Stavanger ein modernaður býur við umleið 250.000 íbúgvum í sjálvum býnum og øllum økinum har rundan um, og býurin hevur nógv tænastuvirksemi, eins og hann hevur stórt sjúkrahús og eitt universitet, har undirvísingin er merkt av ojluvirksemi á altjóða støði.

Stavanger hevur eitt ríkt mentanarlív og er kosin sum mentunarhøvuðsstaður í Evropa 2008 saman við Liverpool í Onglandi.

### Miðdepilin fyri allari oljuvinnuni

Áðrenn olja varð funnin í Norðsjónum, var Stavanger óbeinleiðis við í oljuvinnuni við tað at nógv av heimsins størstu tangaskipum vórðu bygd har, og fleiri reiðarí í býnum áttu tangaskip, sum sigldu kring heimin við olju og gassi.

Eftir at olja varð funnin í Norðsjónum hava skipasmiðjurnar spesialiserað seg í at byggja boriplattformar og aðra útgerð til oljuvinnuna.

Miðskeiðis í 1960-unum byrjaði oljuleitingin í Norðsjónum, og Stavanger gjørdist miðdepilin fyri allari oljuvinnuni í Norra.

Í juni 1972 viðtók stórtingið at Statoil og oljufyrisitingin skuldi vera í Stavanger, og tey fylgjandi árini vaks býurin skjótt og oljuvirksemið gav stórar inntøkur sum komu bæði fólkinum og kommununi tilgóðar.

Býurin hevði sera góðar havnamøguleikar og gott flogsamband og var samstundis ein nóg stórur býur til at kunna veita allar neyðugar tænastur. Býurin lá eisini væl fyri nærhendis oljuøkjunum í Norðsjónum. Altjóða oljufeløg og undirveitarar til oljuvinnuna fluttu til býin í stórum tali.

**Puntur nr. 16**





sansir.fo

**Lyklaklár fígging og trygging til bilin**

Ætlar tú at keypa bil, bjóða vit tær fígging og trygging um eina leið. Tú fert beint inn á bilasøluna, har tú fært landsins bíligastu og skjótastu fígging beinanvegin. Í somu vending avgreiða vit tryggingina. Tú fært lykilin og koyrir avstað.

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari